# Undir einum lítlum træi, liggur... ein bókapakki!

**Allarbesta jólagávan er hørð og fýrakantað og keypt í bókabúðini. Sosialurin viðmælir nýggjar føroyskar bókaútgávur í hvørjum blað í jólamánaðinum.**

## Fiskabókin

### Maturin svimur fyri fótum okkara




Fiskabókin er ein kókibók við øðrvísi uppskriftum upp á tað, sum svimur í havinum kring okkum.

Kokkurin og høvundin Uni Gullfoss, sum gevur bókina út í samstarvi við Miklagarð, sigur soleiðis:

– Tá ið vit hugsa um fisk, hugsa vit vanliga um klassiskar rættir, so sum ræstan fisk, saltfisk, stoktan fisk, frikadellur og knetti. Hetta eru gamlir og sanniliga eisini góðir døgurðarættir.

Men leggja vit í, so hava vit so ómetaliga nógvar aðrar møguleikar, tá tað ræður um fisk. Døgurðin svimur beint fyri føtur okkara.

Umframt vanligu fiskasløgini sum tosk, seið, skrubbu, reyðsprøku, eru mong onnur fiskasløg, vit kunnu fiska og borðreiða. Eitt nú hýsu, steinbít, kalva, hummara, rækjur, krækling. Og hvørt fiskaslag kann gerast til á óteljandi hættir. Tí er tað so spennandi at arbeiða við fiski í matgerð.

Í bókini eru millum annað tríggjar grindauppskriftir. Hetta eru uppskriftir við farra av asiatiskari matmentan.

## Til børnini

## Robin Hood

### Ein sera skemtilig bók um Robin Hood og sjeriffin úr Nottingham.




**Í Sherwood skóginum búgva Robin Hood og káta fylgi hansara av viðhaldsmonnum. Teir eru friðleysir menn og ræna frá teimum ríka og geva teimum fátæku.**

**Størsti fíggindin er sjeriffurin í Nottingham, men eisini hjá honum endar alt við sátt og semju, og hann sleppur at gera tað, honum dámar allarbest: at eta.**

**Hetta er ein myndabók, ið minnir nógv um teknisøgu. Tað er finnin Mauri Kunnas, sum hevur skrivað og teknað søguna um Robin Hood, har allir persónarnir eru okkurt slag av dýri. Hanni Bjartalíð hevur týtt til føroyskt.**

## Í Waffen SS

### – søgan um Sverra Djurhuus

### Ein av mongum føroyskum nazistum

Ein av mongum føroyskum nazistum

Óli Olsen skrivaði bókina Í Waffen SS - søgan um Sverra Djurhuus.

Sverri Djurhuus (1920-2003) var ættaður úr Kollafirði, men búði í Havn.




Stríðsárini var hann, har harðast leikaði á – í Waffen SS – og mangan toygdi deyðin seg eftir honum.

Á vígvøllinum vóru eisini aðrir føroyingar. Teir verða umrøddir í høvuðspartinum: "Aðrir føroyingar í SS"

»Nú krígsins kaldi veruleiki fór at ganga upp fyri okkum, vóru fleiri, sum ynsktu seg heima aftur. Men vit vóru harðliga vandir, og nú var ikki at bakka.«



## JÓLATIPS:

## Kavaflykrur

Tær nýtist

- 1 eggjahvíta
- 2 súpisk. florsukur
- Sukur

Ger soleiðis:

Píska eggjahvítan sera harðan. Blanda florsukurið í.

Koyr blandingina í ein plastikkposa og klipp eitt lítið hol í eina hornið av posanum.

Tekna nú vøkur mynstur, sum til dømis kavaflykrur, hjørtu, einglar ella stjørnur. Stroy vanligt sukur omanyvir og lat turka í nakrar tímar.

Ver varðin tá tú hongur prýðið upp, eftirsum tað lættliga brotnar.